# TÓKU BARNIÐ



**ÆTTLEIÐING** 29 ára gamla Maj-Britt Jacobsen í Havn er í knúsi. Sonurin Markus, sum hon ættleiddi fyri hálvum fjórða mánaði síðan, er tikin frá henni. Orsøkin er gamlar smáar syndir hjá mammuni og pápanum, heldur hon

Randi Jacobsen

Lagið er ringt heima hjá Maj-Britt Jacobsen í Havn. Hon og mamman Majken eru fullkomiliga upploystar í gráti. Hini skyldfólkini syrgja eisini, og vinkonurnar hjá Maj-Britt skiftast um at vera hjá og taka sær av familjuni.

Hetta er ein familja, sum júst hevur mist eitt barn. Barnið er tó ikki deytt. Seinnapartin mánadagin komu myndugleikarnir og tóku hálvt annað ára gamla Markus, sum er ættaður úr Etiopa. Hann varð fluttur til Danmarkar sama dag, og Maj-Britt og tey sleppa ongantíð at síggja hann aftur.

Í 2008 vórðu Majbritt og maðurin góðkend at kunna ættleiða eitt barn.

Tað tók langa tíð at fáa barnið, men 5. januar í ár fingu tey mynd av dreinginum.

27. februar fóru foreldrini saman við báðum ommunum til Etiopa, og 2. mars kundu tey fara eftir honum á einum barnaheimi.

12. mars komu tey so heim til Føroya við Markusi, sum er næstan 20 mánaðir nú.

Tá ið Maj-Britt í fjør fekk ein treytaðan dóm við eitt ára royndartíð fyri eina býtta gerð, fór hon beinanvegin til politiið og bað um eina revsiváttan. Hana fekk hon, og har stóð einki á. So hugsaði hon ikki meira um tað.

Lívið gekk sín dagligu gongd. Markus treivst væl.

## Hevði tað gott

Bæði barnavernd, heilsusystirin og ein pyskologur hava úttalað, hvussu gott drongurin hevði tað. Hann var ein glaður drongur, sum mentist í hvørjum.

– Men fríggjadagin í hinari vikuni kom bræv frá Ríkisumboðnum um, at maðurin hjá mær í fjør fekk ein dóm fyri rúsdrekkakoyring, og at hetta høvdu vit dult, sigur Maj-Britt.

Ikki fyrr enn tá visti hon, at tað finnast tvey sløg av revsiváttanum. Í øðrum slagnum stendur einki, tí ta váttanina kann persónurin brúka, tá ið hann ella hon eitt nú søkir arbeiði. Frá politinum hevði hon fingið at vita, at í hennara váttan stóð einki, tí sambært dóminum skuldi hon hava ein kans aftrat.

Men so er tað hitt slagið av revsiváttanum. Tá ið hægri myndugleikar spyrja eftir revsiváttan, fáa teir alt at vita..

– Høvdu vit vitað hatta, høvdu vit ikki ættleitt eitt barn. Eg skilji heldur ikki, at myndugleikarnir gera slíkar kanningar, eftir at foreldrini hava fingið barnið. Tær kanningarnar áttu at verið gjørdar frammanundan, at eitt barn verður rykt upp úr sínum heimlandi og fer til onnur fólk í einum øðrum landi og knýtir seg at teimum, sigur Maj-Britt.

Í brævi frá Ríkisumboðnum fekk Maj-Britt at vita, at tað var hennara skylda at koma við upplýsingunum um revsing, og at málið nú fór at verða tikið uppaftur.

## Kallað á fund

Málið var fyri hjá Ríkis-



*Tær flestu myndirnar av Markusi hevur Maj-Britt tikið niður, tí hon orkar ikki at síggja tær nú. Á vegginum hongur ein tekning hjá dreinginum, og beint fyri at Markus varð tikin frá henni, skundaði hon sær at fáa eitt minni av hond og fóti hjá dreinginum á pappír*
*Myndir: Álvur Haraldsen*